# Jógvan og Hans Pauli reinsaðir

**Landsstýrismennirnir í ávikavist mentamálum og almanna- og heilsumálum hava einki skeivt gjørt í sambandi við málið um miðnámsskúlan og røktarheimið í Vági, sigur Landsgrannskoðanin í kanning sum júst er gjørd**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tað var í vár, at Hergeir Nielsen, løgtingsmaður, heitti á Landsstýrismálanevndina um at kanna, hvussu handfaringin hevði verið hjá landsstýrismonnunum í mentamálum og almanna- og heilsumálum í sambandi við byggingina av miðnámsskúlanum í Suðuroy.

Eftir ætlan skuldi skúlin byggjast í Vági, har grivið varð út og planerað fyri skúlanum. Hetta landsstýrið hevur tó broytt hesa ætlan soleiðis, at miðnámsskúli skal byggjast í Hovi og røktarheim í Vági.

Tað var í hesum sambandi, at Landsstýrismálanevndin hevur kannað, um landsstýrismenninir, Jógvan á Lakjuni og Hans Pauli Strøm fóru út um sínar heimildir.

Landsstýrismálanevndin heitti í mai mánaði í ár á Landsgrannskoðanina um at kanna, um útreiðslurnar, ið eru hildnar til analysur, fundir og framløgur í sambandi við miðnámsskúlan og røktarheimið í Vági, eru hildnar innan fyri tær kontur sum útreiðslurnar eru rindaðar av, og innan fyri starvsinnihaldið hjá landsstýrismonnunum annars.

Í gjár kom so kanningin frá landsgrannskoðanini, sum m. a. staðfestir, at útreiðslurnar liggja innan fyri ásetingarnar í játtanarskipanini og innan fyri starvsinnihaldið hjá avvarðandi landsstýrismonnum

Í niðurstøðuni sigur Landsgrannskoðanin m. a.:

Sambært almennu reglunum í játtanarskipanini er ein játtan ein heimild hjá landsstýrismanninum at hava útreiðslur til eitt ávíst endamál, í samsvari við tær fyritreytir, sum játtanin er givin eftir.

Sambært serstøkum ásetingum í játtanarskipanini um játtanarslagið rakstrarjáttan (vanligt virksemi), kunnu stovnar »ið skulu gera ætlanir um byggi- og løguarbeiði nýta pening til fyrireikandi kanningar, herundir tørvsmetingar. Útreiðslurnar til framhaldandi fyrireikingararbeiði og projekteringsútreiðslur krevja serstaka løgujáttan.«

Landsgrannskoðanin heldur, at umrøddu útreiðslur liggja innan fyri ásetingarnar í játtanarskipanini fyri tílíkar játtanir á fíggjarlógini, og vísandi til viðmerkingarnar á løgtingsfíggjarlógini fyri kontu 7.23.1.07 »Ymsar felagsútreiðslur« og kontu nr. 8.11.1.08. »Almanna- og Heilsumálaráðið«, og frágreiðingarnar frá landsstýrismonnunum í ávikavist mentamálum og almanna- og heilsumálum, er Landsgrannskoðanin komin til ta niðurstøðu, at útreiðslurnar eru hildnar:

- innan fyri karmarnar á kontu nr. 7.23.1.07. »Ymsar felagsútreiðslur«,
- innan fyri karmarnar á konto 8.11.1.08. »Almanna- og Heilsumálaráðið«, undirkonta 20. »Vanligt virksemi«, og innan fyri starvsinnihaldið hjá avvarðandi landsstýrismonnum.

# - Hevði ikki roknað við øðrum

**Hans Pauli Strøm skilti ongantíð, at formaðurin í Landsstýrismálanevndini gjørdi so nógv burtur úr málinum**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Eg hevði als ikki roknað við øðrum.

So einfalt svarar Hans Pauli Strøm, tá vit biða um viðmerking til niðurstøðuna frá Landsgrannskoðanini.

Hans Pauli Strøm heldur, at hetta var eitt sera løgið mál, sum varð blást alt ov nógv upp av formanninum í Landsstýrismálanevndini, Kára P. Højgaard.

- Tað var ongantíð nakað í hasum málinum, tí sjálvandi hava vit sum landsstýrismenn fulla heimild til at kanna slík viðurskifti, sigur hann.

Hans Pauli Strøm skilir heldur ikki kritikkin, hann fekk frá Kára P. Højgaard, tí hann ikki hevði latið Landsstýrismálanevndini eitt skjal í málinum, sum ikki varð stílað til hansara, men til Mentamálaráðið - og sum Mentamálaráðið hevði latið nevndini.

# Var sannførdur um at alt var í lagi

**Jógvan á Lakjuni ivaðist ikki í, hvør niðurstøðan hjá Landsgrannskoðararnum fór at verða**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Eg var sannførdur um, at hatta fór at verða niðurstøðan. Men tá tú soleiðis verður skuldsettur, so er tað kortini altíð ein lætti at verða reinsaður, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum.

Landsstýrismaðurin sigur, at starvsfólkini í Mentamálaráðnum sjálvsagt kanna slík viðurskifti áðrenn handlað verður. Hann heldur, at ov nógv varð gjørt burtur úr hesum máli.




Tú kemur at arbeiða í einum spennandi og áhugaverdum umhvørvi við stórum dynamikki, professionalismu og opinleika. Tínar uppgávur verða millum annað at gera alt vanligt skrivstovuarbeiði, umsita heimasíður, umseta og rættlesa tekstir, skriva rokningar og gera annað bókhaldsarbeiði. Eisini skalt tú vera við til at fyrireika kunningartiltøk og gera kanningararbeiði í sambandi við uppgávur hjá ráðgevum.

Førleikakrøv
Tú dugir væl at skriva føroyskt, enskt og danskt, og kanst bæði umseta og skriva tekstir eftir fyrisøgn. Tú hevur royndir við bókhaldi, journalisering og at skriva út rokningar. Neyðugt er at tú dugir at arbeiða við teldu, ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og við nærlagni, og megnar at arbeiða við fleiri uppgávum í senn. Tú dugir væl at samskifta og hevur viðkomandi útbúgvingar og royndir.

Vit miðja eftir at starvið verður sett 1. oktober 2005. Løn sambært avtalu. Um hetta hevur tín áhuga, send so eina umsókn við CV og viðkomandi prógvum til:

Syntesa sp/f, Postboks 195,
Tórsgøta 16, FO 110 Tórshavn

- ella við telduposti til: og@syntesa.fo

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 29. august 2005. Um tú vilt vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á tel 311084 ella 223978 og spyrja eftir Ólavi Gregersen.

www.sansir.fo

SYNTESA
BUSINESS DEVELOPMENT

*Syntesa er eitt ráðgevingarfelag innan vinnumenning við bæði føroyskum og útlendskum kundum, ið vanta høga góðsku. Harumframt rekur Syntesa ein skrivstovufelagsskap, har sjálvstøðug feløg eru felags um skrivstovufyrisitara, hølir, móttøku og annað. Umframt Syntesa eru í løtuni hesi feløg í skrivstovufelagsskapinum: Simprentis, SeWave, Bitland, WinIT, Jónsvein Joensen & Fartal sp/f. Tilsamans seks fólk arbeiða dagliga í skrivstovufelagsskapinum.*

## Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum sum á ymiskan hátt hjálptu og gleddu okkum á silvurbrúðleypsdegnum. Ein serstøk tøkk til sangkórið og bindiklubban sum vaktu okkum við sangi.*
***Heilsan Eyðólvur og Estrid***



*Hjartaliga takka vit tykkum øllum sum á tykkara hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara fantastiskan og ógloymandi. Gud signi tykkum øll!*
***Ynskja Karina & Gimmi***